

KASSIN HJÁ KARSTEN *Sagt verður, at Karsten Hansen hevur sitið tungur á kassanum, meðan pengarnir hava streymað inn. Hetta er púra rætt. Úrslitið er ein sterkari búskapur enn nakrantíð áður. Karsten vil hava føroyingar at vera sjálvbjargnar, eisini tá ið tíðirnar gerast verri. Tí hevur hann stýrt, sum hann hevur. Hvussu heldur tú, skilið hevði verið, um onkur annar enn Karsten ansaði kassanum?*

# AVGJØRD BÚSKAPAR-STÝRING

Tjóðveldisflokkurin hevur sitið við fíggjarmálum í seks góð ár.
Trýstið at lata slúsurnar upp hevur verið øgiligt.
Men Tjóðveldisflokkurin hevur staðið ímóti og stýrt búskapinum við fastari hond.
Hesi árini hava vit goldið kontant fyri størri útbyggingar enn nakrantíð áður.
Skuldin er goldin niður í helvt. Og blokkstuðulin er minkaður.
Kortini hava vit havt yvirskot hvørt einasta ár.
Búskaparstýringin hevur gjørt, at vit eiga nærum tvær milliardir á bók at standa ímóti við,
og at vit í dag klára sveiggj í búskapinum uttan at enda í kreppu.

**Ein atkvøða** fyri Tjóðveldisflokkinum
er ein atkvøða fyri avgjørdari búskaparstýring og tryggum, sjálvberandi búskapi.

E

TJÓÐVELDISFLOKKURIN
VEL FRAMTÍÐINA!

www.tjodveldi.fo





# Minnist til okkum sum gloyma

**Alzheimerfelagið hevur eitt ynski til tykkara, sum fara at manna Føroya Løgting og Landsstýrið. Vit arbeiða við at seta á stovn eina miðstøð við m.a. dagheimi fyri minnisveik.**

Okkum tørvar fíggjarligan stuðul til eina tvey ára royndarverkætlan í Suðurstreymoy. Roynist ætlanin væl, kunnu líknandi miðstøðir stovnast kring landið. Fíggjarligi tørvurin er stívliga ein millión krónur um árið til allan raksturin.

Henda ætlan brýtur upp úr nýggjum, har vit ganga undan og vísa øðrum á gongdar leiðir.

Málið er at skapa eitt fyrimyndaligt dagheim fyri minnisveik, har tann einstaki verður stimbraður eftir tørvi. Lívið fær innihald, ið lættir um, og ger tey før fyri at búgva heima sum longst. Tey avvarðandi kunnu røkja sínar skyldur ella taka sær av løttum uttan at vera nívd av plágandi samvitskubiti. Um kvøldið savnast húskið aftur.

Eftir arbeiðstíð kann heimið nýtast til ráðgeving, hýsa bólkum fyri avvarðandi ella nýtast til fundarvirksemi. Í vikuskiftum kann húsið vera hugnalig café fyri dement og avvarðandi teirra, har tey kunnu hittast og hugna sær uttan ampa og ótta fyri, hvat tann minnisveiki kann finna upp á at gera.

Úrslitið av hesari royndarverkætlan skal leggjast fram á norðurlendskum fundi í Føroyum í 2006, tá ið føroyska Alzheimerfelagið verður vertur.

Gongst sum ætlað verður talan um røktarfyribyrgjandi tiltak, ið kann gerast øðrum fyrimynd og íblástur.

Tey minnisveiku hava eitt ynski, sum tit hava høvi til at gera til veruleika, ja, kanska fær onkur tykkara brúk fyri verkætlanini seinri ella longu nú. Demens rakar stóran part av fólkinum beinleiðis ella óbeinleiðis. Hvørt árið fáa vit uml. 160 nýggir tilburðir. Gloymið ei tey, ið gloyma.

Alzheimerfelagið er røddin hjá teimum minnisveiku og minnið hjá politikkarum.

SANSIR TEL 355 355

Demens er felagsheiti fyri ymisk sjúkueyðkenni, sum koma av evnafrøðiligum broytingum í heilanum. Hesar broytingar føra so líðandi við sær, at tann sjúki fær ilt við at hugsa, at skilja, at døma um, at leggja til rættis, at fata, og ættarskilið fer av lagi, t.v.s., at sálarliga og andaliga verður hann skerdur. Broytingarnar kollvelta tí lívið hjá tí sjúka og hansara avvarðandi.

**Verkætlanin kann lesast á www.alzheimer.fo**

Alzheimerfelagið